# Føroyskir bilførarar »på gl

**Mánadagin 19. september fór eitt so gott sum fullsett flogfar úr Vágum beinleiðis til Roskilde við fólki, ið sluppu at royna seg á eini koyritekniskari breyt og læra nakað um ferðslu og trygd**

FERÐSLUTRYGD

*Magnus Gunnarsson*
*Maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Eirikur Lindenskov/ Magnus Gunnarsson*

Eitt av flogførunum hjá Atlantsflog fleyg mánamorgunin beinleiðis úr Vágum til Roskilde við umleið 90 fólkum, sum høvdu teknað seg til eitt dagsskeið um ferðslu sum Ráðið fyri Ferðslutrygd, og dekkfyritøkurnar Super Dekk og Goddyear Danmark høvdu skipað fyri í felag á Køreteknisk Institut (KTI) í býnum.

Fullsett flogfar til Roskilde, sum kanska er mest kendur fyri sínar tónleikafestivalar. Onkur nevndi í skemti, at tiltakið kundi hóskandi verið nevnt "Roskilde trafikfestival" ella "Ud at løre med de skøre".

Endamálið við dagsskeiðinum var at varpa ljós á eitt mál, sum hevur verið uppi at vent seinastu 30 árini, at vit í Føroyum hava brúk fyri eini tekniskari royndarkoyribreyt og hálkubreyt.

Í flestu londum um okkara leiðir er tað eitt krav, at tey sum taka koyrikort hava fingið frálæru á royndarkoyribreytum og hálkukoyribreytum.

Nú varð so ein roynd gjørd at vísa bæði lands- og kommunalpolitikarum, stovnsleiðarum, koyrilærarum, fjølmiðlafólki og øðrum hvat tað er, málið snýr seg um.

Luttakaranir sluppu veruliga at royna, hvat tað við siga, at koma út á glattan ís og missa tamadhaldið á bilinum eina løtu.

Køreteknisk Institut (KTI) í Roskilde er ein av størstu koyriteknisku breytunum í Danmark. Tilsamans er anleggið 150.000 túsund fermetrar við fleiri ymiskum koyribreytum. Stovnurin skipar hvørt ár fyri yvir 15.000 ymiskum skeiðum í koyriteknikki, bæði fyri privatfólk, stovnar og fyritøkur.

Á teimum ymisku breytunum kunnu bilførarar undir tryggum umstøðum betra um síni evnir at koyra bil, bæði á turrum og vátum vegi og á hálkubreytunum, har bilførarar kunnu royna, hvussu tað kennist at bremsa fyri síðan at missa tamarhaldið á bilinum, meðan ein instruktørur alla tíðina vegleiðir og ger viðmerkingar til koyringina.

Tá tað er ein sannroynd, at tey flestu óhappini á vegunum eru orsakað av



*Ein instruktørur vegleiðir og ger viðmerkingar til koyringina*



*Roskilde Kommune hevur gjørt nógv fyri at betra um ferðslutrygdina í býnum. Her er ferðalagið við eina vælvirkandi ferðsluforðing. Fremst á myndini eru Marin Katrina Frýdal og Boði Haraldsson frá Tórshavnar kommunu*





*Skeiðið á Køreteknisk Institut (KTI) í Roskilde var fyriskipað av Ráðnum fyri Ferðslutrygd, og dekkfyritøkunum Super Dekk og Goddyear Danmark, f.v.: Niels Wennicke, stjóri á KTI, Kenneth Saust, sjtóri hjá Goodyear í Danmark, og Fríðrikur Bláhamar, stjóri á Super Dekk*